og tað kann mann ofta gloyma í einum lítlum samfelagi sum okkara.

Búi legði út við einari søgu um tað at lata sáð frá sær, sum á góðum gerandismálið eitur »at koma«. Hann greiddi frá á greiðum, enskum máli, at nakrir menn í Japan ongantíð koma, tá teir eru í seksuellari interaktión. Teir trúgva, at tú missir orku og kraft, um tú gert tað. Men um tú hevur seksuella interaktión uttan at koma, byggir tú ístaðin upp orku og kraft. Teir trúgva eisini, at mann eldist, tá mann kemur. So teir telja ikki aldurin eftir árum, men eftir hvussu ofta mann er komin ígjøgnum lívið. Summir, tá teir presentera sín aldur, eru tískil trý ár. Ella fimm. Ella 13, kanska enntá 14.

- Men hvat sker, um vit í vesturheiminum byrja at telja okkara aldur uppá handan mátan? spurdi Búi.

- Hvussu gamlir eru vit? Tað er sikkurt ógvuliga varierandi, men eitt er vist, og tað er, at vit eru øgiligа, øgiliga gamlir, endaði han við at siga, og ikki ein munnklovi í salinum var í friði.

Búi var ræðuliga væl upplagdur hetta kvøldið, ljóðið var fantastiskt, og tónleikararnir spældu væl. Eg haldi næstan, at hann var betri upplagdur enn nakrantíð áður, tí eg havi ongantíð sæð hann so útfoldaðan og peppaðan. Sjónleikarin í honum kom langt út um pallkantin og fekk gott og væl allar damurnar í salinum at fnisa. Eg haldi, at hann hóskar seg best á einum rúmligum palli við ordiligum ljóðumstøðum, har hann ordiliga fær pláss at ganga amokk og har rødd hansara er í einum ordiligum klangi. Tað er tá, hann er stuttligast og mest sjarmerandi og veruliga nær út til øll tey, ið eru til staðar og lurta.


Eivør Pálsdóttir var í flottum, villum kjóla hjá Barbaru í Gongini tann ultimativa, forførandi trøllakonan

## At sleppa at elska og hata

Tiltøkini, sum vóru stáplað upp hetta kvøldið, vóru ógvuliga fjølbroytt í stíli, og mær dámdi verri enn so alt. Eg var tó í tí hepnu støðu, at eg bara skuldi leggja mær populera tónleikin og mótan í geyma, og eg haldi, at hesi vóru eitt deiliga hóskandi suplement til ta fínmentanina, sum eisini varð umboðað, eitt nú verkini eftir Kára Bæk og Róa Paturson, sum eru ein heilt annar heimur enn populeri tónleikurin og mótin. Tað vóru góðir mótpólar, sum gjørdu, at tú fekst pláss sum áskoðari at bæði elska og hata, smílast og irriterast. Haldi, at tað er gott, tá tað snýr seg um eitt so stórt tiltak. Annars er vandi fyri, at mann vamlast og druknar í poleraðum bróstsukuri og sjokolatasós. Eg vil heldur hava eitt sindur av hvørjum, so eg ordiliga sleppi at taka støðu til tað, ið eg upplivi. Annars keði eg meg.

Tað gjørdi eg tó ikki hetta kvøldið í Norðurlandahúsinum, tí har var eitt sindur av hvørjum. Alt hevði okkurt uppá seg, bara fullkomiliga uppá hvør sín máta. Og tað er stuttligt, tá mann hevur væntað sær tað øðrvísi.







*Kul, progressivt og feitt at síggja føroyskan klædnamóta so up to date, heldur ummælarin um mótasýningina hjá Guðrun & Guðrun, Jóhannu á Steinum og Barbaru í Gongini*